## Minningardagur flytir

Hósdagin, allahalgunardag kl. 10.00 verður minningarhald teirra sjólætnu. Í ár verður minningarhaldið hildið á Vinnuháskúlanum Nóatún 2, og ikki á Hotel Tórshavn, sum siður hevur verið undanfarnu ár. Jóannes Eidesgaard, løgmaður og Hanus Simonsen, prestur tala. Aftaná verður farið niðan í Viðalundina, har løgmaður leggur krans við minnisvarðan.



## Atlantsflog flýgur fyri SAS

Trupulleikarnir hjá SAS við Dash Q-400 flogførunum, sum øll eru sett, føra til, at nógv onnur flogfeløg mugu hjálpa flogfelagnum. Eitt teirra er Atlantsflog. Onnur eru Air Greenland, Danish Air Transport, Spanair, Sterling og Jettime. Hetta kostar sum vera man SAS milliónir um dagin. Bara í dag hevur SAS í Danmark seks flogfeløg á flogi úr Keypmannahavn til einar 50 flogferðir. Atlantsflog flýgur til London City Airport, Stavanger til Turku í Finnlandi og til Luxembourg.

# Minningarhald yvir Stellu Argus

MINNINGARHALD

*Óli Jacobsen*
*olij@sosialurin.fo*

Sunnudagin kl. 14 varð skipað fyri minnngarhaldi og avdúking av einum minnisvarða fyri teir, sum fórust við Stella Argus fyrst júst 50 árum síðani, soleiðis sum tað varð greitt frá í Miðvikuni seinasta mikudag.

Tað var reiðaríið P/f Kimbil við Aksel Hansen stjóra, sum hevur reist hendan framúr vakra minnisvarðan, sum er gjørdur av Hans Paula Olsen. Tað vóru Kimbil saman við bygdaráðnum í Kvívík, sum skipaðu fyri avdúkingini.

Veðrið var hampuligt, og tað vóru nógv fólk til staðar. Tað vóru eisini komin avvarðandi ymsa staðni frá í landinum. Av sjóvinnufeløgunum var Føroya Reiðarafelag umboðað við formanninum. Serligan dám á minningarhaldið setti Kamarkórið hjá Kára Bæk, sum sang fleiri sangir.

Byrjað varð við, at Poul Hansen, sonur Aksel, bjóðaði øllum vælkomnum. Aftan á at sangkórið hevði sungið, varð minnisvarðin avdúkaður av børnum hjá kvívíkingum, sum vóru við Stella Argus.

Vegna tey, sum sótu eftir, talaði Jens Kannuberg, sum misti ein beiggja, hann æt Egil Jacobsen. Aftan á hann talaði bygdaráðsformaðurin í Kvívík, Boje Christensen, sum annars er versonur ein, sum fórst, nevniliga Niels Andreassen.

Síðan talaði Óli Jacobsen, og Marjun Bæk prestur endaði.

Aftaná var boðið til ein drekkamunn í Glæmunu, har tað eisini vóru nógv fólk. Sigast skal, at kvívíkingar vóru sera blíðir.

Vit fara í blaðnum í morgin at hava eina størri frásøgn við myndum frá minningarhaldinum, og tá fara vit at taka í røðurnar, sum vóru hildnar.



*Frá minningarhaldinum í Kvívík*

# Vónin um G! 2008 ikki slept

**Jón Tyril, høvuðsmaður handan G!festivalin, vónar, at festivalurin aftur verður á skránni komandi summar.**
**– Vit hava dugað ov illa at stýrt fíggjarliga partinum, tað viðgangi eg blankt. Men vónandi er álitið ikki fokið á tiltakið hóast tað, sigur hann**

TÓNLEIKUR

*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*



*Innan nakrar vikur kemur endaliga svarið um framtíðina hjá G! festivalinum. Jón Tyril vónar, at tað fer at bera til at fáa tiltakið upp á beinini aftur*

G!-festivalurin hevur veruliga verið í andglettinum seinastu tíðina. Í síðstu viku varð kunngjørt, at felagið handan G!festivalin var farið í trotarbúðarviðgerð, og at felagið skuldi strikast, tí eingin peningur var at rinda rokningar fyri. Men hóast festivalurin er í tungum sjógvi, hevur høvuðsmaðurin handan tiltakið góðar vónir til enn ein festival í summar.

### Nógv vilja stuðla

- Eg hopi at man fær tiltakið at halda fram. Nógv hava vent sær til mín, bæði feløg, persónar og stovnar, sum vilja stuðla og hjálpa til, soleiðis, at tað kann lata seg gera at fáa tiltakið upp á beinini aftur, og seta tað í eina haldbara skipan, greiðir Jón Tyril frá.

Spurdur um ikki trúðvirðið á G!festivalin er rokið nú, svarar Jón, at tað er torført at svara uppá.

- Tiltakið sjálvt hevur verið gott og hevur riggað væl, so eg trúgvi, at álitið á sjálvt tiltakið er gott. So gott sum allar afturmeldingar hava verið góðar, og ummælarar, bæði føroyskir og útlendskir, hava verið framúr positivir. Men tað er greitt, at fleiri av kreditorunum hava mist nógvan pening, so teir eru kanska meiri varnir nú, sigur Jón Tyril.

Men hvør er orsøkin til, at eitt so væleydnað tiltak, sum G!festivalurin øll árini hevur verið, kann fáa so stórt hall? Talan er jú um milliónaupphæddir, sum nú vanta í roknskapinum.

Til tað svarar Jón Tyril at útreiðslurnar eru hækkaðar ár undan ári.

- Vit hava ikki dugað nóg væl at hildið í teymarnar. T. d. kundu vit kanska havt forhandlað okkum til betri sáttmálar við onkrar av bólkunum, umframt at vit kundu havt roynt at funnið bíligari loysnir í fleiri førum. Vit hava ikki hugsað tað nóg væl ígjøgnum, og ikki havt nóg góða fíggjarliga stýring, staðfestir Jón Tyril.

Hann heldur, at tað átti at verið onkur, sum við kritiskum eyga hugdi at tølunum, soleiðis, at sloppið kundi verið undan hesi støðuni.

### Bíðistøða

Jón sigur, at tey fyrr í ár byrjaðu fyrireikingarnar til komandi festival, men allar ætlaninar eru fyribils lagdar á ís.

- Vit hava sett allar fyrireikingar á stand-by, til vit vita hvat fer at henda. Vit mugu bíða eftir niðurstøðuni, og so taka vit tað harfrá. Men vit hava fingið nógv tilboð frá fólki, sum vilja vera við at endurskapa festivalin, so vónandi sleppa vit í gongd at arbeiða við okkara ætlanum aftur skjótt, tí standa tær ov leingi á stand-by, er stórur vandi fyri, at tær vera av ongum, greiðir Jón Tyril frá.

Spurdur um Jón Tyril aftur verður ein av berandi kreftunum handan G!, svarar hann, at tað hevur hann ikki tikið støðu til enn.

- Eg fari at gera tað, sum eg kann. Um mín persónur er til hindurs fyri, at festivalurin 08' verður veruleiki, so taki eg meg fegin aftur. Um eg kann hjálpa við at vera við, so vil eg gera alt, sum eg kann. Men tað eru onnur fólk, sum mugu døma um, hvørt eg skal vera við ella ikki, tí tað snýr seg í stóran mun um álit, vísir Jón á.

Hann heldur, at tað er ein ávísur vandi fyri, at støðið á festivalinum fer at falla komandi ár.

- Allir hesir trupulleikarnir kunnu sjálvsagt ávirka tiltakið negativt. Ein vansi kann vera, at fólk ikki tora at seta pening í tiltakið aftur. Ein annar vansi er, at jú seinni vit veruliga kunnu fara í gongd við fyrireikingarnar, jú verri verður tað at fáa góðar bólkar til festivalin, greiðir Jón Tyril frá.

Spurdur nær vit fáa endaliga svarið um hvussu verður við G!festivalinum, svarar Jón, at hann vónandi kann koma við einum svari um G! 2008 innan nakrar fáar vikur.